Eysturkommuna

Mál til viðgerðar: 25/00035 Broyta býarplan matr. nr. 339ar og 339a í Fløtugerði í Leirvík

Málsviðgeri: Unn Sørinardóttir Perdomo

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 23.01.2025 | 5/25 | 25/00035-2 |
| 2 Býráðið | 30.01.2025 | 5/25 | 25/00035-2 |

# BROYTA BÝARPLAN MATR. NR. 339AR OG 339A Í FLØTUGERÐI Í LEIRVÍK

**Málslýsing:**

Eysturkommuna hevur fingið eina áheitan frá Almanna- og mentamálaráðnum, um at byggja ein almennan bústovn í Eysturkommunu, tørvur á umleið 4000 fermetar til hendan bústovnin.

Sum partur av býarskipanarliga ætlanini fyri Eysturkommunu, hevur umsitingin arbeitt við at fáa pláss fyri einum almennum bústovnum í Eysturkommunu. Í hesi tilgongdini verður dentur lagdur á, at almenni bústovnurin skal liggja uppat einum bústaðarøkjum, og ikki leggjast á avmarkaði øki uttan fyri vanligu bústaðir.

Í hesum arbeiðinum hevur umsitingin hugt eftir møguleikum í Leirvík, og tá dentur varð  lagdur á at almennir bústovnar skulu liggja uppat sethúsaøkjum, var millum annað hugt eftir bústaðarøkinum í Fløtugerð í Leirvik. Her er partvís er bygt sum sethúsabygging og íbúðarbygging. Umsitingin hevur síðan arbeitt viðari við hesum og hevur mett at ein partur av økinum í Fløtugerði í Leirvík er sera væl egna til almennar bústovnar. Øki umsitingin hevur ætlanir um at gera til almennar bústovnar svarar til 4000 fermetrar.

Umsitngin hevur verið í samráð við Almanna- og mentamálaráðið, um staðsetingina av einum almannum bústovni í Fløtugerði í Leirvík, og hevur Almanna- og mentamálaráðið góðtikið hesa staðseting.

| |
|---|
| Ætlaða øki til almennar bústovnar liggur í einum B2, Bústaðarøki við serstakari byggisamtykt, og gevur tað ikki loyvi at byggja almennar bústovnar,  tí verður mælt til at broyta byggisamtyktina til E, Almenn endamál og stovnar.<br><br>Sí viðfesta kortskjal.<br>Uppskot til grundøki til AMMR – kortskjal 1 dagfest 16.12.2024. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til, at taka undir við broytingini. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 23. januar 2025**

Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 30. januar 2025**

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.